gult cyan magenta svart





## C5 stationcar



Citroën C5, ið er avloysari hjá Xantia og tí størra XM, verður seinni at fáa sum ein rúmligur stationcar.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Aventime



## Coupé

Renault Aventime Coupé, ið er ein luksusbilur við nógvari trygdarútgerð, verður framleiddur í september, bilurin hevur ein 2,9 litur V6 motor við 210 hk.

*Kelda: Motor Magasinet*



## Rover sum MG

Á bilaframsýningini í Geneve, var ein fullfíggjað røð av Rover bilum við MG búmerkjum. Rover 75 stationcar kemur at eita MG ZT-T.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Lexus LS430 - kappast við heimsins bestu bilar

**Almenna søgan um luksusbilin Lexus er tann, at fyri 17 árum síðan savnaðust nakrir Toyota stjórar til ein loyniligan fund, har teir samdust um at gera ein luksusbil sum skuldi kappast við heimsins bestu bilar**



Bilar
*Magnus Gunnarsson*

Á Detroit Auto Show í 1989 varð fyrsti Lexus LS400 sýndur fram. Fyrsta árið vórðu seldir meira enn 40.000 Lexus bilar í USA. Fólk, sum vóru blivin troytt av Cadillac og Lincoln, fingu her ein bil, sum ikki einans var sera haldgóður, men ein bil har tænastustøðið var so høgt sum tey ikki áður høvdu sæð makan til. Um bilurin skuldi á verkstað, bleiv hann skjótt og væl umvældur, vaskaður, bunkraður og settur í túnið ella inn í bilskúrin. Hetta var ein av grundunum til ta sera stóru framgongdina hjá Lexus.

### Ljóðleysur luksusbilur

Eftir stuttari tíð var Lexus ein tann mest seldi luksusbilurin í USA. Bilurin var eisini nakað heilt fyri seg, rúmligur og sera vælgjørdur við einum næstan ljóðleysum V8 motori. Lítil og eingin munur var á ljóðinum, um bilurin koyrdi við 50 km/t inni í býnum ella við 210 km/t á motorvegnum, har Lexus veruliga kom til sín rætt.

Innan er LS430 líka rúmligur sum Mercedes S-klassin í tí longru útgávuni, uttan at bilurin er vorðin størri. Eisini er alt, ein kann ynskja sær, við panelum úr kaliforniskum valnøtutræ, og fínasta slag av leðursetrum, umframt næstan alla elektronisku tøkni, sum man kann vænta í hesum klassanum. Prísurin á LS430 er ikki ásettur enn, men tá tann nakað minni Lexus GS 430 kostar eina millión í Danmark, kostar hesin ikki minni.

*Kelda: Bilen Motor & Spor*



### Lexus LS 430 aut.

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4,3 litur V8 305 hk |
| 0-100 km/t | 6,7 sek |
| Toppferð | 250 km/t |
| Bensinnýtsla | 8,2 km/l |
| Dekkstødd | 225/55-17 |
| Stødd og vekt | |
| longd | 501,0 cm |
| breidd | 183,0 cm |
| hædd | 147,0 cm |
| eginvekt | 1775 kg |
| Viðførisrúm | 468 litrar |

# Bilteknari avdúkar komandi Opel luksusbil



BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Epsilon-plattformurin hjá General Motors skal eftir ætlan brúkast til tann nýggja Opel Vectra og Omega, eins og Saab bilarnar. Hesin plattformur er gjørdur til at brúka á bilum við trekk á framhjólunum, bakhjólunum ella á øllum fýra. Teir størru bilarnir sum til dømis Opel Omega, trekkja vanliga við bakhjólunum.

Teknarin DeLusi avdúkar her, hvussu ein komandi stórur Opel møguliga kemur at síggja út. Teir stóru Opel bilarnir hava fyrr verið nevndir Admiral, Senator og Diplomat, so kanska kemur hesin, ið sær sera spennandi út, at eita Opel President.

Nær bilurin kemur á marknaðin, ella hvørjum prísklassa hann verður í, vita vit onki um enn.

*Kelda: FDM / Motor*





# Sera trupult hjá ungum fiskimonnum at fáa skip

**Føroya Banki heldur, at førdi fiskivinnupolitikkurin førir við sær, at útlendskur kapitalur í størri og størri mun fer at fáa rættindini til føroyskt tilfeingi av fiski**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*

– Tað er blivið ómøguligt hjá ungum fiskimonnum at útvega sær skip, uttan so, at teir hava rættiliga munandi eginfígging.

Tað staðfestur Føroya Banki í ársfrágreiðing síni til aðalfundin, sum verður í næstum.

Í ársfrágreiðingini fær eisini tann førdi fiskivinnupolitikkurin hjá landsstýrinum eisini nøkur orð við á vegnum .

Føroya Banki vísur á, at teir høgu fiskaprísirnir seinnu árini, hava ført við sær, at virðið á fiskirættindum er økt munandi.

– Hesi viðurskifti eru orsøkin til, at nýggir luttakarar hava sera trupla atgongd til vinnuna , tí hesir mugu gjalda seljarum fyri rættindi, sum myndugleikarni r áður ókeypis hava sett í umfar.

– Afturat hesum kemur, at eftir lógini um vinnuligan fiskiskap, hava tey, sum keypa skip, ikki loyvi til at veita trygd fyri fígging í tí partinum av skipsvirðinum, sum er tengdur at nevndu fiskirættindum. Og hetta er ofta størsti parturin, sigur Føroya Banki.

Bankin sigur, at á henda hátt hava løggevararnir ikki einans gjørt tað sera trupult hjá nýggum luttakarum at fáa atgongd til hesa vinnu.

– Í veruleikanum er tað vorðið ómøguligt hjá ungum fiskimonnum at útvega sær skip, uttan so at teir hava rættiliga munandi eginfígging.

### Trupult at skilja

Føroya Banki heldur, at tað er sera trupult at skilja, hví myndugleikarnir vilja avmarka rættindini hjá reiðarum at veðseta fiskirættindi, tí í veruleikanum kunnu teir frítt selja hesi rættindi.

Hetta kunnu teir, hóast søla er eitt munandi størri tiltak enn ein veðseting

– Ein av avleiðingunum av, at fiskirætindi eru so dýr og at tey ikki kunnu veðsetast, og at tað tískil er so trupult hjá ungum føroyingum at koma upp í vinnuna, er óivað, at útlendsk kapitaláhugamál í størri og størri mun yvirtaka rættin til at gagnnýta føroyskt tilfeingi av fiski, sigur Føroya Banki



*Við tí fiskivinnupolitikki, sum nú verður førdur, er tað sera trupult hjá ungum fiskimonnum at útvega sær skip, sigur Føroya Banki í ársfrágreiðing síni. Her standa tey og veittra, tá Gøtu Tróndur kemur*

# ILA nú eisini staðfest í USA



*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Fyrstu tekini um ILA smittu eru nú funnin í USA, í Maine, staturin í landnyrðingshorninum á USA við markið til Kanada. Hetta veit norska vevsíðan Intrafish at siga.

Smittan er funnin á einum alibrúki á Cobscook Bay norðarlaga á Maine strondini. eigararnir av alibrúkinum Atlantiv Salmons of Maine, hava tikið allan fiskin og beint hann av vegnum. Teir mistu 2,1 millión krónur.

Alibrúkið liggur tætt við New Brnswick í Kanada og har er staðfest ILA.

At ILA fór at koma til USA hevur verið vantandi, tí at í 1996 og 1997 vóru fleiri kanandisk alibrúk rakt stutt norðanfyri.

ILA varð fyrstu ferð staðfest í Noreg í 1974, í Kanada 1996, í Skotlandi 1998 og í Føroyum 1999. ILA sjúkan er eisini staðfest í Kili, hóast vinnan har avsannar hetta. Roknað verður við, at smittan hevur verið á eysturstrondini í Kanasa í minsta lagi seinastu 100 árini og tað vil siga, langt áðrenn nøkur aling var á leiðini.

Norskir granskarar, sum hava granskað í hesi sjúku í mong ár eru av tí sannføring at ein strangur eftirlitspolitikkur, sum ES stílar fyri ikki er av tí rætta. ILA virusið finnst allastaðni í náttúruni. Einasta ið hjálpir er, um alararnir broyta hugburð við alingini. Tað vísur seg, at er fiskurin nógv strongdur, so er hann veikari mótvegis smittuni.

# Lágur toskaprísur

Toskaprísurin á Fiskamarknaðí Føroya er lækkaður nakað í seinastuni og tað er nú ikki so løgið. Vit eru stødd mitt í fagrasta várróðri og nógvur toskur verður landaður. Tað er størri útboð enn eftirspurningur og tí lækkar prísurin. Fiskavirkini hava nóg mikið við at arbeiða undan.

Meðalprísurin á toski á telefon uppboðssøluni lá í gjár á 13,85 kr. fyri kiloið. 60 tons av toski vóru seld í gjár. Men hýsan heldur prísin, har var miðalprísurin kr. 14,50. Níggju skip bjóðaðu fisk á telefonuppboðssøluni í gjár .

Miðalprísurin var kr. 16,29 0g selt var fyri 2,4 millión.

## Línubátarnir vestanfyri

Útróðrarbátarnir, sum royna við línu, serliga av Skálafjørðinum og úr Klaksvík, royna vestanfyri í Vágahavinum í hesum døgum. Hann hevur verið høgur í ættini nú í fleiri dagar, ligið av landnyrðingi og tá lívir í Vágahavinum. Bátarnir hava fingið væl. Kallanes hevði týsdagin góð 8000 pund og Havsrún hevði tað sama. Hesir báðir eru úr Klaksvík.

Klaksvíksbátarnir fara ikki til hús. Teir avreiða á uppbooðssøluni á Toftum og síðan verður engda línan flutt úr Klaksvík út á Toftir. Á hendan hátt spara teir tíð og sigling.

## Føroyingar dugnaligir

Ein kanning sum Farek hevur gjørt, ið samanber rakstrarúrslitið hjá fiskivinnuni í Noregi, Føroyum og Íslandi vísir, at føroyingar fáa meira burtur úr nógv minni tilfeingið enn brøðratjóðir okkara.

Í áhugaverdari sending í útvarpinum týskvøldið greiddi Helgi Jacobsen frá hesi kanning, sum Óli Samró frá Farek hevur staðið fyri. Ein av høvuðsørsøkunum til góða úrslitið í dag er, at nú er vatntætt skott millum skip, virkið, og tænastuvinnuna hjá fiskivinnuni. Eitt annað sum spælir inn er, at føroysk skip eru ikki skuldarbundin, tí fleiri vóru saneraði eftir kreppuna fyrst í nítiárunum.